# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba í ONH høpi

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um ONH krabba

### Krabbi í nasa- og hjáholum

- Nýuppstaðin einsíðug nasalstenosa uttan upplagda orsøk
- Blóðugt flot úr nøsuni
- Afturvendandi bløðing úr nøsini uttan upplagda orsøk
- Sár, ið lekja illa
- Sjónlig ífylla í vestibulum nasi ella nasakaviteti
- Trot/knútur á kjálka ella displacering av eyga uttan aðra upplagda orsøk

### Krabbi í barkanum ella hálssvølgi (larynx- og hypopharynx krabbi)

- Hæsi (hæshed) í > 2 vikur uttan bata og uttan aðra/upplagda orsøk hjá sjúklingi, ið er > 40 ár
- Ilt við at svølgja og/ella globuluskensla við strálandi pínu til oyruni >2 vikur
- Nýuppdagað recurrensparesa

### Krabbi í munnholu- og munnsvølgi (oropharynx)

- Sár, ið lekja illa
- Sjónlig ella palpabul ífylla í munnholu ella svølgi

### Krabbi í nasasvølgi (rhinopharynx)

- Einsíðug úrskiljandi (sekretorisk) otitis media hjá vaksnum uttan infektiøsa orsøk
- Kraniunervaávirkan (nn. facialis, abducens og trigeminus)
- Uppruni (inuittar, asiatar og fólk kring Miðjarðarhavið hava hægri títtleika)*

### Krabbi í spýttkertlum

- Nýkomin ífylla í spýttkertli
- Vøkstur í kendari ífyllu í spýttkertli
- Ífylla í spýttkertli, ið ávirkar andlitsbragd (n. facialis)

### Krabbi í skjaldkertli (thyroidea)

- Ífylla í thyroidea við hæsi (hæshed) (recurrensparesa)
- Skjótur vøkstur av knúti í thyroidea
- Harður immobilur knútur í thyroidea

### Metastasir á hálsinum

- Støddarøktir eitlar á hálsinum uttan infektiøsa ella aðra benigna orsøk
- Cysta lateralt á hálsinum hjá sjúklingi > 40 ár

## Kanningar, ið ávísandi lækna skal gera

Objektiv kanning inkl. palpatión av hálsinum

Roykir sjúklingurin - hvussu nógv pakkaár?

Um ífylla verður funnin í spýttkertli, so eigur at verða víst til UL áðrenn ávísing til krabbaútgreining

## Handfaring av residiv og nýggjum tilburði av ONH krabba

- Í uppfylgjanartíðarskeiðnum innan 5 ár - ONH deildin LS
- Eftir uppfylgjanartíðarskeiðið - nýggja ávísing til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabba í ONH høpi" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026